Tórshavn, tann 16. mars 2023

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Hoyringssvar viðvíkjandi broyting í løgtingslóg um veiðigjald

Reiðaríini Framherji, JFK Trol og Enniberg loyva sær hervið at gera hesar viðmerkingar til uppskoti til broytingar í løgtingslóg um veiðigjald. Ein hoyringarfreist upp á eina viku er alt ov stutt tíð. Serliga tá talan er um uppskot, sum hevur stórar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Vanligu krøvini um at útgreina árinini av lógarbroytingini á ymsu bólkarnar av vinnuni eru heldur ikki uppfylt, tí er tíðin alt ov stutt til at gera viðkomandi útgreiningarnar.

Prísur toskur	Verandi skipan	01.aug.23	01.aug.26	01.aug.23	01.aug.26
Kiloprísur	Kilogjald	Kilogjald	Kilogjald	Avgjaldsbroyting	Avgjaldsbroyting
13.50	0,37	0,14	0,41	-63,6%	9,1%
14.50	0,47	0,44	0,73	-7,7%	53,8%
15,50	0,54	0,62	0,85	14,3%	57,1%
16,50	0,70	0,83	1,16	17,6%	64,7%
17,50	0,83	1,05	1,40	26,3%	68,4%
18,50	0,93	1,30	1,67	40%	80,%
19,50	0,98	1,46	1,95	50%	100%
20,50	1,03	1,85	2,15	80%	110%
21,50	1,08	2,15	2,58	100%	140%
22,50	1,13	2,48	2,93	120%	160%
23.50	1,18	2,82	3,29	140%	180%
24.50	1,23	3,19	3,68	160%	200%
25.50	1,28	3,57	4,08	180%	220%
26.50	1,33	3,71	4,24	180%	220%

Ein tvífalding av veiðugjøldunum økir um politiska váðan og skaðar kappingarførið

Veiðigjøldini á fiskiskapinum í Barentshavinum eru ivaleysa høg sum er. Tey eru munandi hægri enn hjá hinum fiskivinnutjóðunum, ið eru virkin í sama fiskiskapi. Grønland, Ísland og Norra hava ikki álagt hendan fiskiskapin veiðigjøld. Sostatt vil ein hækking minka munandi um kappingarførið flotans.

Tað er vánaligur vinnupolitikkur, at karmarnir og fortreytirnar fyri eini vinnu alla tíðina verða broyttar. Tí tað viðførir til eyka ótryggleika og óvissu í vinnuni, sum aftur viðførir minni íløguhug, tá

fortreytirnar fyri kappingarførari fígging versna. Hetta er galdandi fyri fiskivinnuna í ólukkumát, har karmarnir blíva tiknir upp til nýggja viðgerð eftir hvørt løgtingsval. Í mun til ætlanirnar nú um at økja munandi um inntøkurnar frá veiðugjøldum áløgd pørtum av fiskivinnuni tykist høvuðsorsøkin vera vaksandi almennar útreiðslur og harav hall á landsins fíggjarlóg. Og tað gevur orsøk til stúran fyri gongdini framyvir.

Tí er tað skeivt, tá tað í viðmerkingunum til uppskotið til lógarbroyting verður skrivað:

"Tað, at gjøldini hækka, so at størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið, ger at kravið til vinnuna um effektivitet og góð veiðitól økist. So hóast uppskotið viðførir ein fíggjarligan kostnað fyri vinnuna, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti."

Ætlaða politiska inntrivið at tvífalda veiðugjaldið fyri fiskiskapin í Barentshavinum skaðar kappingarførið og minkar varandi um íløguhugin framyvir.

Teoretiska tilfeingisrentan er minkað síðsta árið

Ár	Kvota	Niðurskurður
2021	27.304	
2022	23.544	-14%
2023	21.395	-9%

Sakliga sæð er tann metta tilfeingisrentan í fiskivinnuni ikki varandi økt seinasta árið. Heildarkvotan er minkað við 14% í 2022, 9% í 2023 og væntað lívfrøðingarnir framhaldandi minking komandi ár. Hetta minkar um teoretisku tilfeingisrentuna, tá føstu útreiðslurnar eru øktar. Útreiðslurnar til eitt nú olju og rentur eru munandi øktar síðsta árið, sum eru varandi hægri rakstrarútreiðslur. Rentan hjá ECB er hækkað við 3 prosentstigum síðani í juli í fjør og væntast at hækkað við 1 prosentstigi aftrat. Hesi trý reiðaríini hava gjørt stórar íløgur í nýggj skip, hvørs lán og rentur skulu afturrindast yvir stutt áramál. Prísirnir fyri fiskaúrdráttir á heimsmarknaðinum gjødu eitt lop í samband við inflasjónina í fjør, men stórur partur av hesum inntøkuvøkstri endar hjá manningini, sum aftur rindar størra helmingin í lønarskatti og vøruavgjøldum.

Tað er ósakligt at grundgeva fyri hækkingini (tvífaldingini) av tilfeingisgjaldinum á fiskiskapin í Barentshavinum við at vísa til tað, sum landskassin missir av inntøku frá tilfeingisgjøldum á pelagiska fiskiskapin undir Føroyum, tí hesar kvotur eru latnar í býti til Russar. Tilfeingisgjøld eru grundað á eina meting av tilfeingisrentu á fiskatilfeinginum, sum reiðarí hava fingið rættindi frá landinum at troyta. Tí er tað ósakligt at knýta ásetingina av tilfeingisgjaldinum álagt fiskiskapin í Barentshavinum til tilfeingisgjøldini á pelagiska fiskiskapin undir Føroyum.

Reiðaríini hava júst gjørt íløgur fyri yvir eina milliard krónur, sum eru lutvíst lánifíggjaðar íløgur. Lánirentan er hækkað ógvusliga síðsta árið, allíkavæl ætlar Landsstýrið nú at tvífalda tilfeingisgjaldið og leggur stein oman á byrðu. Nýggju skipini geva eitt munandi íkast til at gera føroysku fiskiveiðuna í Barentshavinum meira burðardygga, sosialt og umhvørvisliga, tá arbeiðsumstøðurnar gerast munandi betur og orkunýtslan gerst effektivari.

Ein útrokning av mettu teoretisku tilfeingisrentuni plagar at taka útgangsstøði í bókaða virðinum á skipunum og einum ávísum rentusatsi. Nú íløgur eru gjørdar í tríggjar nýggjar trolarar, so ávirkar hetta mettu tilfeingisrentuna negativt, tá sonevnda "normala" avkastkravið økist munandi. Ein útrokning vísir, at við einum rentusatsi á 6% (áður brúkt av Búskaparráðnum) er økingin í árliga avkastkravinum 52 mió.kr. nú íløgur eru gjørdar fyri 1,3 milliardir krónur. Íløgurnar eiga soleiðis at minka um árliga tilfeingisgjaldið frá Barentshavsflotanum við hesi upphædd. Harnæst talar hækkingin av risikofríu rentuni hjá ECB við 3 %-stigum síðani síðsta summar fyri enn eini hækking av normala avkastkravinum á íløguni við 38 mió.kr. aftrat. Tilsamans ein minking av teoretisku tilfeingisrentuni á 90 mió.kr. árliga.

Grøna orkuskiftið stendur fyri framman. Heilt ítøkiliga merkir hetta fyri tey 3 reiðaríini, at skrottvirðið á nýggju trolarunum er munandi lægri sambært lániveitarunum, tí tøkniliga menningin væntast at taka dik á seg komandi árini. Fyri teir 3 trolararnar tilsamans svarar hetta til eini 25-30 mió.kr. meira í árligum avskrivingum. Eisini merkir hetta, at reiðaríini mugu leggja til síðis til at skifta til orkuvinarligari tøkni, tá hendan er tøk. Landsstýrið hevur orðað ein veðurlagspolitikk, har málið er at skunda undir grøna orkuskiftið í skipaflotanum. Ein tvífalding av tilfeingisgjaldinum er í beinleiðis andsøgn við hesi ynskir. Tí tess hægri tilfeingisgjaldið er, tess minni verður til íløgur í grøna orkuskiftið. Hetta er í greiðari andsøgn við politikkin í eitt nú Norra, har myndugleikarnir hava sett í verk stuðulsskipanir til at eggja reiðaríunum til at nýta grønari orkukeldur.

At enda vilja vit nýta høvi at ávara um, at ein so ógvuslig hækking í veiðugjaldinum á fiskiskapinum í Barentshavinum kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri virksemi okkara, tá tað kann gerast trupult at fáa endarnar at røkka, um bara okkurt annað eisini gongur ímóti.

Vinarliga

Sp/f Framherji	P/F Enniberg	P/F JFK Trol
Anfinn Olsen, stjóri	Kaj Johannesen, stjóri	Hanus Hansen, stjóri